## Borgarligi fylgibólkurin

Ì borgarliga fylgibólkinum í sambandi við heildaryvirlitið yvir Sjógøtu og Miðbýin á Tvøroyri hava hesi sitið: Anna Kirstin Thomsen, vinnulívskvinna, Signar Dam, kommunulækni, Sven Roest, múrarameistari, Poul Poulsen, politistur, Fríði Jensen, Apotekari. Fylgibólkurin hevur fylgt við arbeiðnum og hevur viðmerkt tær loysnir, sum hava verið skotnar upp. Serkunnleikin í hesum arbeiðnum, sigur, at samstarvið við fylgibólkin hevur verið fyrimyndarligt og avbera fruktagott fyri endaliga úrslitið, tí limirnir í bólkinum hava alla tíðina reist iva, sett spurningar og er komin við alternativum uppskotum, soleiðis at nógvar ymsar áskoðanir eru komnar fram. Sjógøta er tann niðari høvuðsvegurin, sum gongur mitt ígjøgnum býin. Tað er vegurin, sum vanliga hevur verið róptur Niðari Vegur.

# Tvøroyri tryggast og

*Soleiðis fara steðgiplássini til bussar á Tvøroyri at síggja út. Bussarnir skulu ikki setast við vegsíðuna ella inn á parkeringspláss. Ístaðin smalkar vegurin sum eitt tímaglas og bussurin steðgar mitt á vegnum. Hetta bæði tálmar ferðsluni og bøtir um trygdina hjá ferðafólkinum*




**Ein verkætlan, sum ongantíð áður er roynd fyrr í Føroyum, skal gera Tvøroyri til nakað heilt serligt**

BÝARMENNING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Á Tvøroyrar Býráð er eru tey í fullari ferð við at leggja framtíðina til rættis.

Og tað gera tey við ætlanum, sum bæði eru stórar og slóðbrótandi.

Í hesum sambandi hevur Tvøroyrar Býráð nú lagt eina stóra um umfatandi ferðslutrygdarætlan, sum skal gera Tvøroyri til ferðslutryggasta pláss í landinum.

Hetta hevur ongin kommuna í Føroyum roynt áður, so talan er um eina slóðbrótandi verkætlan, har Tvøroyri gongur undan, sum eitt fyridømi hjá øðrum kommununum, hvat ferðslutrygd viðvíkur.

Men eisini eyga og sálin skulu hava sítt og tí verður samstundis stórur dentur lagdur á bæði umhvørvi og útsjónd.

Undir herrópinum ferðslutrygd, umhvørvi og vakurleiki fór býráðið so til verka og savnaði góðar kreftir at leggja arbeiðið til rættis.

Sostatt savnaðu tey eitt toymi av arkitektum og verkfrøðingum, sum gingu saman um hesa ætlanina so at ein heildarloysn kundi spyrjast burturúr, har bæði er hugsað um ferðslutrygdina, umhvørvið og útsjóndina.

Men fyri at geva hesum serfrøðingunum eitt lokalt mótspæl, varð eisini eitt toymi av tvørafólki valt í ein bólk, at fylgja við arbeiðnum, at ummæla loysnir, sum arkitektar og verkfrøðingar komu við, og at koma við egnum uppskotum.

### Ein amboðskassi

Arkitektar og verkfrøðingar eru nú liðug við sítt arbeiði og fyrr í vikuni varð útslitið lagt fyri býráðið til góðkenningar.

Á fundi mikukvøldið, samtykti býráðið einmælt at taka undir við ætlanini.

At talan veruliga er um eitt víttfevnandi og framskygd dygdarverk gekk sjón fyri søgn, tá ið ætlanin varð løgd fram á tíðindafundi eftir býráðsfundin mikukvøldið.

- Hetta er ein ætlan, sum strekkir seg um allan býin úr Froðba, sum er innast í botninum í Trongisvági.

Økið, sum ætlanin fevnir um, eru báðir vegirnir út í Froðba og so tann niðari høvuðsvegurin ígjøgnum Tvøroyri, heilt inn á botn.

Tann ovara vegin er onki gjørt við, men ætlanin er, at hann skal brúkast til tað tungu ferðsluna ígjøgnum býin.

Enn er ongin kostnaðarmeting gjørd, men greitt er, at so víðfevnd ætlan verður ikki veruleiki eftir einum ella tveimum árum.

- Hetta er heldur ikki meint sum ein skræddaraseymað loysn og tað er ongin sum sigur, at tað fer at síggja akkurát soleiðis út, tá ið alt arbeiðið er liðugt.

- Hetta er mest at meta sum ein amboðskassi, ella sum ein hugkveikjari, tá ið framtíðarætlanir skulu setast í verk, søgdu arkitektar og verkfrøðingar.

- Men við hesi ætlanini hevur býráðið eini greið stevnumið at arbeiða fram ímóti, tá ið framtíðar Tvøroyri skal sniðgevast, tó at teir ymsu partarnir kunnu dagførast so hvørt.

Tá ið ætlanin varð løgd fram, vísti teir serkønu á týdningin av, at býráðið sum skjótast setir skjøtil á arbeiðið og setir onkran part av ætlanini í verk, so at tað gongur sjón fyri søgn hjá borgarunum, at hetta eru ikki bara luftkastell og bláur roykur, men at álvari býr aftanfyri.

Og tað er Býráðið eisini sinnað til, tí býráðslimir søgdu, at ætlanin er nú at brúka heystið til at finna útav, hvat kann setast í verk næsta og, so at peningur kundi setast av á fíggjarætlanini til endamálið.

Enn er støða ikki tikin til, hvar ætlanin er at byrja, men tað varð nevnt, at tað kundi verið skilagott at byrja onkustaðni úti í miðbýnum.

Men í høvuðsheitum verða tað tey býráðini, sum koma eftir hetta, sum litið upp í hendurnar at seta ætlanina í verk og at raðfesta í hvørjari raðfylgju, arbeiðast skal.

### Frammanfyri sína tíð

At Tvøroyrar Býráð fer undir eina ætlan, vísir, at býráðið er frammanfyri sína tíð.

Tá ið ætlanin varð løgd fram, vísti Gunn H. Møller frá LBF á, at slíkar ferðslutrygdarætlanir eru lógarkravdar í øðrum Norðurlondum, men ikki í Føroyum.

Sostatt er Tvøroyrar Býráð farið undir hetta, hóast tað ikki er lógarkravt og hon heldur, at hetta er at taka null-hugsjónina í ferðsluni í álvara.

Eitt tiltak, sum verður sett í verk, er, at eftir allari Sjógøtu skal bara verða loyvt at koyra 40 km/t.

Men harafturat verða verður tálmað á ein heilt serligan hátt.

Kanningar vísa, at verður ein fótgangari ákoyrdur av bili, sum koyrir 40 km um tíman, er møguleikin fyri at hann doyr, 30%. Men koyrir bilurin 50 km um tíman, er møguleikin heili 80% fyri at hann doyr.

Tá ið bussar koyra ígjøgnum býin, skulu teir ikki inn á parkeringspláss ella til síðuna at steðga. Í staðin verður vegurin smalkaður niður í eitt spor við hvørt steðgipláss og fólk fara so av mitt á vegnum og kunnu stíga beinleiðis á gongubreytina.

Hesi tímaglas-steðgiplássini føra við sær, at bæði mótkoyrandi ferðsla og ferðsla, sum kemur aftaná bussin, hevur onki val, enn at bíða eftir bussinum. So vítt vit vita, er hetta fyrstu steðgipláss av hesum slagi í landinum.

Ígjøgnum býin skulu sjey slík steðgipláss gerast. Hesi plássini minka munandi um